


# Nú kanst tú gerast partur av einum sterkum toymi, tí vit í IDEmøblum leita eftir einum ágrýtnum og framfýsnum lærlingi

**Um tú ...**

- brennur fyri at selja og hevur eyga fyri og hug at arbeiða við innrætting
- hevur sjálvsálit, ert fyrikomandi og opin
- hevur FHS, hægri handilsskúli ella aðra viðkomandi útbúgving

**... so ert tú møguliga júst tann, vit leita eftir.**

Sum partur av IDEmøbla-toyminum kanst tú verða vís/ur í at hava ein spennandi gerandisdag í Føroya stórsta møblahúsi. Vit hava 45 ár á baki, og øll hesi árini hava vit lagt dent á at hava dygdargóðar vørur í handlinum og eina tænastu, sum er í hásæti.
Arbeiðsviðurskiftini eru góð við skiftandi arbeiðstíðum innan fyri eina vanliga arbeiðsviku. Við í lærutíðini sum søluatstøðingur er skúlagongd í Danmark ella í Føroyum.

**Umsókn:**
Er hettar nakað fyri teg, send skjótast gjørligt eina stuttorðaða umsókn til:

**IDEmøblar**
**Postboks 3220**
**FO-110 Tórshavn**
**ella ein t-post til ea@ide.fo**

Vit hava brúk fyri tær at byrja sum skjótast, men vit bíða fegin eftir tí rætta.

**IDEmøblar**



# Koppur & Kanna leitar eftir einum evnaríkum og miðvísum lærlingi til Føroya lekkrasta búnýtishandil

Vit í Koppi & Kannu bjóða eitt spennandi lærupláss sum søluatstøðingur í einum stórum nútímans búnýitshandli, ið setir tænastuna í hásæti. Sum lærlingur í Koppi & Kannu verður tú partur av øllum liðum í handlinum - alt frá vørumóttøku og skráðseting til sølu og kundarøkt. Her fært tú fryntligar og dugnaligar starvsfelagar og arbeiðsviðurskiftini eru góð við skiftandi arbeiðstíðum innan fyri eina vanliga arbeiðsviku. Við í lærutíðini er eisini skúlagongd í Danmark ella í Føroyum.

**Vit ímynda okkum, at okkara lærlingur...**

- Er áhugað/ur í sølu og kundatænastu og dugir væl at samskifta við viðskiftafólk.
- Er fyrikomandi, arbeiðsom/samur og røkin.
- Hevur stóran áhuga í hvat rørir seg innan búnýtisvørur og innrættning og tí er íðin eftir at seta seg inn í nýggjar vørur og rák innan øki.
- Hevur FHS, hægri handilsskúli ella aðra viðkomandi útbúgving.

Koppur & Kanna er partur av stóra møblahúsinum IDEmøblar, ein fyritøka, sum hevur 45 ár á baki, og øll hesi árini hava vit lagt dent á at hava dygdargóðar vørur í handlinum og tænastu í hásæti.

**Umsókn:**
Er hettar nakað fyri teg, send skjótast gjørligt eina stuttorðaða umsókn til:

**IDEmøblar**
**Postboks 3220**
**FO-110 Tórshavn**
**ella ein t-post til ea@ide.fo**

Vit hava brúk fyri tær at byrja sum skjótast, men vit bíða fegin eftir tí rætta.

Koppur & Kanna